Ítróttar
Sosialurin
Nr. 114 • fríggjadagur • 16. juni 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Oddasessurin aftur í eygsjón



*Vinnur EB/Streymur heimadystin móti VB/Sumba, kunnu teir aftur rópa seg oddalið í Formula-deildini*

**Eftir miseydnaðu ferðina í Runavík, vilja teir hjá EB/Streymi leggja nógv fyri, nú møguleiki er at endurvinna oddasessin í Formula-deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var lítið, sum gekst eftir vild, tá EB/Streymur seinasta vikuskiftið vitjaði í Runavík. Fyri tað allar mesta vóru tað vertirnir, sum stýrdu dystinum, og tað førdi í seinasta enda við sær, at oddasessurin varð mistur.

Tapið hjá HB mikukvøldið bar tó við sær, at tað nú aftur ber til at røkka sessinum, og tann møguleikan ætlar EB/Streymur ikki at lata fara framvið.

Til dystin hesa ferð er hópurin styrktur við John Hera Dam, sum er afturkomin til landið. Umframt Arnbjørn Hansen, sum framvegis er skaddur, er einasta fráveran hjá EB/Streymi á venjarabeinkinum. Hjálparvenjarin, Sámal Erik Hentze, er nevnliga burturstaddur.

Hjá VB/Sumba er lagið sjálvandi batnað, eftir at teir fingu javnleik í Gundadali móti B36. Talan verður tó enn einaferð um sera trupla uppgávu, og hesa ferð mugu teir standa seg uttan Hallur Dam Joensen, sum er leikbannaður.

## Dystir um vikuskiftið

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 17.06 | NSÍ-Skála | Petur Reinert |
| 18.06 | EB/S-VB/S | Lassin Isaksen |
| 18.06 | B68-B36 | Jens Petur Brattalíð |
| 18.06 | ÍF-KÍ | Páll Augustinussen |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 17.06 | HB-TB | Lars Müller |
| 17.06 | AB-B71 | Dan Højgaard |
| 17.06 | FSV04-LÍF | Ransin N. Djurhuus |
| 17.06 | SÍ-VB/S | Rúni Gaardbo |
| 17.06 | Royn-KÍ | Jón Sigurd Gleðisheygg |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 18.06 | NSÍ-MB | Jan á Líðarenda |
| 18.06 | HB-ÍF | Ørvur á Lag |
| 18.06 | Skála-B68 | Edvard Højgaard |
| 18.06 | EB/S-GÍ | Hentza Johansen |
| 18.06 | Fram-B36 | Laurits í Króki |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 18.06 | AB-B36 | Ransin N. Djurhuus |
| 18.06 | KÍ-EB/S | ÍF |
| 18.06 | GÍ-HB | Thorvald Petersen |
| 18.06 | NSÍ-SÍ | Ingi Olsen |

## HM-endaspælið í fótbólti

**Bólkur C**

| Dagur | Kl. | Dystur |
|---|---|---|
| 16.06 | 14.00 | Argentina-Serbia & Montenegro |
| 16.06 | 17.00 | Holland-Fílabeinsstrondin |

**Bólkur D**

| | | |
|---|---|---|
| 16.06 | 20.00 | Mexico-Angola |
| 17.06 | 14.00 | Portugal-Iran |

**Bólkur E**

| | | |
|---|---|---|
| 17.06 | 17.00 | Kekkia-Ghana |
| 17.06 | 20.00 | Italia-USA |

**Bólkur F**

| | | |
|---|---|---|
| 18.06 | 14.00 | Japan-Kroatia |
| 18.06 | 17.00 | Brasil-Argentina |

**Bólkur G**

| | | |
|---|---|---|
| 18.06 | 20.00 | Frakland-Suður Korea |
| 19.06 | 14.00 | Togo-Sveis |

**Bólkur H**

| | | |
|---|---|---|
| 19.06 | 17.00 | Saudi Arabia-Ukraina |
| 19.06 | 20.00 | Spania-Tunis |

# Tølini tala

| | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HB-GÍ | - | 4-1 | 3-1 | 3-3 | 2-2 | 3-0 | 2-3 | 5-0 | 2-0 | 3-0 | 2-0 | 3-2 | 8-2-1 | 32-12 |
| NSÍ-Skála | 2-1 | 3-3 | 1-0 | 2-0 | 2-0 | 3-1 | - | - | - | - | - | - | 5-1-0 | 13-5 |
| EB/S-VB/S | - | 6-1 | 1-1 | 0-2 | 2-0 | 0-1 | 1-3 | - | - | - | - | - | 2-1-3 | 10-8 |
| B68-B36 | - | - | - | 0-2 | 1-0 | 1-4 | 0-2 | 1-3 | 1-2 | 2-3 | 0-3 | 1-0 | 2-0-7 | 7-19 |
| ÍF-KÍ | 2-3 | 3-0 | 0-3 | 1-6 | - | - | - | - | 0-1 | 0-0 | 1-9 | 1-2 | 1-1-6 | 8-24 |